# Norðborg fiskað f

**FISKIVINNA** Í fimtan mánaðir hevur verksmiðjuskipið Norðborg fiskað fyri sama virðið, sum skipið kostaði at smíða. - Hýruparturin bara í ár er einar 50 miljónir krónur. Hetta sæst heilt sikkurt aftur í nærumhvørvinum og í samfelagnum sum heild, sigur ein fegin skipari, Jón Rasmussen




**FLOTT**

*Í fimtan og ein hálvan mánaða hevur Norðborg longu fiskað fyri tað, sum var sáttmálaprísurin fyri skipið í Chili – ella fyri út við 250 miljónir krónur*

Mynd: Dávur Winther

Vilmund Jacobsen

Føroyski nótaflotin fer eftir øllum at døma at hava eitt sera gott ár í ár, hvat veiðivirði viðvíkur. Orsøkin er í fyrsta lagi økta makrelkvotan og góða veiðan, sum verið hevur eftir makreli. Hvørjar avleiðingarnar á hinari síðuni verða av, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, í ár tók Føroyar burturúr strandalandasamstarvinum um makrel, veit eingin í løtuni.

Bæði politiska skipanin í Føroyum og vinnan eru fullkomiliga samd um, at føroyski parturin í býtinum av heildarkvotuni av makreli millum Føroyar, Noreg og ES hevur verið ov lítil. Hinvegin hava partarnir ikki verið samdir um, hvussu rættast er at gera til tess at røkka einum størri prosentparti av kvotuni.

Tá Noreg og ES ikki vildu lata Føroyum ein frægari part enn tey sløku 5%, sum parturin hevur verið, tók Jacob Vestergaard málið í egnar hendur og ásetti Føroyum eina makrelkvotu á 85.000 tons fyri 2010. Føroyar verða tó við aftur í samráðingunum millum strandalondini um býtið fyri 2011.

### Tvær síður...

Enn hevur føroyski nótaflotin ikki kent so meinan svíða av avgerð landsstýrismansins, tó at røddir bæði í Noreg og ES næstan hava hótt við "morði og brandi", tí Føroyar hava dittað sær at fiskað eina hampiliga nøgd av makreli í føroyskum sjógvi.

Føroysk nótaskip hava tó møtt uppøstum fiskimonnum í Skotlandi, sum hava sett seg upp ímóti, at makrelur úr føroyskum sjógvi verður landaður í teirra havnum og til teirra virkir.

Men eins og "medaljan" hevur eina baksíðu, hevur hon so sanniliga eisini eina framsíðu, sum er nógv økta veiðivirðið og økti hýruparturin til manningarnar í føroyska nótaflotanum í ár. Aftrat hesum hava eisini onnur skip, eitt nú ísfiskatrolarar, fingið nakað burturúr makrelinum í heyst.

Aftrat øllum hesum hevur føroyski fiskiflotin nú staðiliga prógvað, at nógvur makrelur er í føroyskum sjógvi í betri tíðini av árinum og út á heystið.

### Sera gott ár

Jón Rasmussen, sum í skifti við beiggja sín, Boga Rasmussen, førir verksmiðjuskipið Norðborg, dylur ikki, at teir hava gjørt eitt rimmar ár higartil í ár.

– Árið hjá okkum hevur roynst sera væl. Norðborg hevur higartil í ár fiskað fyri út við 150 miljónir krónur. Skipið fór fyrsta túrin hin 3. juni í fjør, og í 2009 fiskaðu vit fyri slakar 100 miljónir krónur. Samanlagt hevur Norðborg soleiðis í fimtan og ein hálvan mánaða fiskað fyri út við 250 miljónir krónur.

Sosialurin kann leggja aftrat, at veiðivirðið hesar mánaðirnar er tað sama, sum skipið kostaði at smíða!

Við Norðborg hvønn túrin eru umleið 30 mans og við tí manningarskifti, sum er, eru einir 55 mans knýttir fast at skipinum. Tó hava fleiri enn hesir 55 menninir verið við, tá eitt árið er umliðið.

Jón Rasmussen væntar, at gjøgnum eitt heilt ár munnu einir 70 mans við avloysarum hava verið umborð á Norðborg.

– Higartil í ár hava vit goldið stívliga 50 miljónir krónur í hýrum, og aftrat teimum ringvirkningum, sum eru knýttir at skipinum, er vist, at hesin peningur sæst aftur ymsastaðni í nærumhvørvinum og í samfelagnum annars, leggur hann aftrat.

### Stórt meirvirði

Í fjør kundi Norðborg fiska eini 4.000-5.000 tons av makreli, harav umleið 2.800 tons lógu eftir ófiskað, og eru nú komin aftrat kvotuni í ár.

Samlaða nøgdin av makreli, sum skipið kundi fiska í 2010, er soleiðis soleiðis sløk 15.000 tons, tá alt er talt við.

Tá Sosialurin skifti orð við Jón Rasmussen í gjár, hevði hann ikki neyvu tølini við hondina, men hann heldur, at veiðivirðið av makrelinum higartil í ár liggur um einar 70 miljónir krónur móti umleið 45 miljónum krónum seinasta ár.

– Hetta er soleiðis eitt meirvirði upp á einar 25 miljónir krónur, sum økta kvotan av makreli hevur skapt, sigur hann.

Norðborg er framleiðsluskip, sum virkar svartkjaft, sild og makrel til matvøru, og soleiðis er eisini nógv tann størsti parturin av veiðini farin til matna.

Skiparin vísir á, at við tað, at eingin visti, hvussu leingi makrelurin fór at standa í føroyskum sjógvi í heyst, er ein ávísur partur av veiðini hjá Norðborg farin til ídnað í Fuglafirði.

– Fyri føroysku sakina í makrelspurninginum hevur tað eisini sín týdning fyri Føroyar, at vit klára at fiska

**»** **...økta makrelkvotan hevur givið okkum eitt meirvirði upp á einar 25 miljónir...**

JÓN RASMUSSEN, SKIPARI